# SÁRA & ALEKS

Ein handbók og tveir filmar um barnavernd



# INNGANGUR

**Opinleiki og gott samskifti styrkir álitið hjá almenninginum á barnaverndina. Barnaverndin er hjálparin hjá børnunum. Ein týdningarmikil ambitión í er tí, at børn og ung skulu vita meira um barnaverndina. Ein háttur at náa tí er, at tey, sum starvast í barnaverndartænastuni, samskifta beinleiðis við børn og ung.**

Filmarnir og handbókin um Sáru og Aleks eru gjørd, fyri at tú, sum dagliga arbeiðir við barnaverndarmálum í barnaverndartænastuni, hevur eitt nýtiligt amboð, tá ið tú skalt greiða børnum og ungum í fólkaskúlanum frá um barnaverndina. Við filmunum og handbókini sum pedagogisk amboð kanst tú bjóða teg fram at vitja skúlarnar í barnaverndarøkinum og saman við lærarunum geva børnum og ungum innlit í, hvat barnaverndirnar gera. Við hesum frálæruátaki fáa eisini lærararnir meira kunnleika til barnaverndina. Upplýsingartilfarið er fyrst og fremst ætlað næmingum úr 4. flokki og upp í umleið 8. flokk. Tað kortini einki til hindurs fyri, at tilfarið verður brúkt bæði til yngri og eldri næmingar, um tú og lærarin meta, at tað er egnað til teirra eisini. Eisini er tilfarið vælegna at brúka í samband við kunningarátøk til fakfólk, lesandi og onnur áhugaði.

Nógv í barnaverndartænastuni hava royndir í at greiða skúlabørnum frá um barnaverndina. Filmarnir og handbókin eru ætlað sum hjálparamboð, og tað er tí ikki neyðugt, at uppleggið í handbókini verður fylgt til fulnar. Dialogur fæst á ymsan hátt, og tann einstaki kann laga sítt egna pedagogiska upplegg alt eftir staðbundnum fortreytunum.

## Endamálið við at greiða børnum og ungum frá barnaverndunum er

- Børn/ung skulu vita, at vit hava eina barnavernd
- Børn/ung skulu vita, hví vit hava eina barnavernd
- Børn/ung skulu vita, hvussu tey kunnu koma í samband við barnaverndina, um tann einstaki næmingurin ella onkur, tey kenna, treingir hjálp frá barnaverndini

## Uppskot um framferðarhátt, tá ið tú brúkar filmarnar og handbókina

- Tú kanst fyrireika teg við at hyggja filmarnar ígjøgnum einar tvær ferðir (kanska saman við arbeiðsfeløgum), so tú kennir gongdina í filmunum væl. Tú eigur at lesa uppskotini til spurningar at seta í flokkinum ígjøgnum, so tú hevur innlit í, hvussu eitt samskifti fæst í lag við næmingarnar um filmarnar, og um hvørja hjálp barnaverndin kann veita. Tú kanst fremja tiltakið sjálv/ur ella saman við einum arbeiðsfelaga.

- Tú setir teg í samband við skúlan og gert avtalu um at kunna næmingarnar úr 4. flokki og upp í 8. flokk um barneverndina. Tú kanst biðja um, at skúlin skipar fyri tí praktiska, so klárt er at vísa filmarnar við ljóði. Vit mæla til, at umleið hálvur annar tími verður settur av til tiltakið. Tað er av stórum týdningi, at lærarin er við, tí hann kennir næmingarnar.

*...framhald á næstu síðu*

- Tú eigur at byrja við at siga, hvør tú ert, og at tú starvast í barnaverndartænastuni, og siga, at tú ert komin at kunna um barnaverndina. Tað ger einki, um tú spyrt, um nakar hevur hoyrt um barnaverndina og skrivar nøkur orð á talvuna um tað, sum tey vita um barnaverndina frammanundan. Tey kanst tú so brúka aftur upp undir endan, tá ið tú tekur samanum og samanbera tað, tey vistu frammanundan við tað, tey vita nú.

- Tú vísir filmarnar. Mælt verður til at byrja við ”Sara”og síðani ”Alex”. Tað ger einki, um tú vísir filmarnar tvær ferðir, tí tað kann vera trupult at fáa alt við fyrstu ferð. Tá ið næmingarnir hava sæð teir, tekur tú filmarnar hvør sær og brúkar spurningarnar, sum eru skotnir upp, fyri at fáa gongd á ein dialog við flokkin. Tú kanst sjálvandi eisini koma við spurningum sjálv/ur.

- Tá ið tú saman við flokkinum ert komin ígjøgnum uppleggið og hevur skrivað telefonnummarið hjá barnaverndartænastuni á talvuna, kanst tú enda við at samanbera tað, sum næmingarnir vistu um barnaverndina frammanundan við tað, sum teir vita um barnaverndina nú.

## Týdningarmikil viðurskifti tú mást hava greiðu á frammanundan

- Byrjar ein næmingur at siga frá egnum trupulleikum (ella trupulleikum hjá onkrum hann/hon kennir), skal hann steðgast vinaliga, so hann ikki heldur fram í plenum. Í slíkum førum eigur lærarin taka eina samrøðu við næmingin aftan á kunningartiltakið. Lærarin má síðan taka støðu til, um hann skal skriva eina fráboðan til barnaverndartænastunna við støði í tí, sum kemur fram í samrøðuni, og møguliga skipa fyri hjálp til tann, tað snýr seg um.

- Veitst tú, at næmingar í teimum valdu flokkunum hava samband við barnaverndina, eigur tú at síggja til, at næmingurin og foreleldrini ella tey, ið varða av umsoganini frammanundan fáa at vita, at tú kemur í skúlan at kunna alment um barnaverndina – og at tú ikki kemur í sambandi við støðuna hjá hesum næminginum. Tú eigur eisini at fáa greiðu á, um næmingurin vil geva til kennar, at tit møguliga kenna hvønnannan.

- Um ein næmingur, sum hevur samband við barnaverndina, kortini byrjar at fortelja um tað í plenum, eigur næmingurin vinaliga at verða hindraður í at koma við útgreinandi upplýsingum har á staðnum. Sum málsviðgeri eigur tú tá at mæla læraranum til at avtala við næmingin og foreldrini ella tey, ið varða av umsorganini, hvussu næmingurin í flokkinum á ein góðan hátt kann orða seg um støðu sína, um næmingurin ynskir tað. .



# SÁRA

# 1

## Endamálið er at eggja næmingum til at lýsa og seta orð á tað, sum hendir í filminum

- Hvat hugsar tú, tá ið tú  sært filmin um Sáru? Skriva minst tvey dømi um, hvat tú hugsar! Lat næmingarnar svara ein og ein í flokkinum, so tit vita, hvat hugsað verður í skúlastovuni. Minst til, at eingin svarar skeivt, tað er huga-sambondini hjá børnunum, tað snýr seg at fáa fram.
- Hvat bagir mammu Sáru?
- Hvat halda tit er orsøkin til, at einki breyð er í breyðkassanum?
- Hvat halda tit er orsøkin til, at Sára spýtir kornfleksið út aftur?
- Hvat halda tit er orsøkin til, at mamman liggur á sofuni?
- Hvat er tað, sum Sára tekur úr sofuni og setir á borðið?
- Hví lá ein fløska á sofuni?
- Hví breiðir Sára eitt teppi yvir mammuna?
- Hví snakkar hon um at fáa skeld frá læraranum?

# 2

## Endamálið er at fáa næmingarnar at liva seg inn í støðuna hjá høvuðspersóninum

- Hvussu hevur Sáru tað?
- Hvussu halda tit, tað er at vera Sára?
- Hvussu er tað at fara upp púra einsamøll, lata seg í, eta morgunmat, busta tenn og finna alt fram, sum tú skalt hava við í skúla uttan at fáa hjálp?
- Hví halda tit, at Sára fegin vil vera superhetja?
- Hvat halda tit er gott í lívinum hjá Sáru?
- Hvat halda tit Sára vildi ynskt var øðrvísi?
- Sára reagerar upp støðu sína við at spæla superhetja – hon roynir at klára seg væl á tann hátt. Halda tit, at onnur børn kunnu reagera øðrvísi, tá ið tey uppliva slíkt sum Sáru er fyri? Hvussu kunnu hugsa tit tykkum, at onnur børn kunnu reagera?





# 3

## Endamálið er at eggja næmingum til at lýsa og seta orð á tað, sum hendir í filminum

- Hvat hugsar tú, tá ið sært filmin um Aleks?
  Skriva minst tvey dømi um, hvat tú hugsar!
  Lat næmingarnar svara ein og ein í flokkinum, so tit vita, hvat hugsað verður í skúlastovuni. Minst til, at eingin svarar skeivt, tað er hugasambondini hjá børnunum, tað snýr seg at fáa fram.
- Hvat bagir pápa Aleks?
- Hvat halda tit er orsøkin til, at Aleks og pápin ikki hava gott samband við hvønn annan beint nú?
- Hvat halda tit er orsøkin til, at pápin so sjáldan hyggur upp á Aleks?
- Hvat halda tit kann vera orsøkin til, at pápin næstan ikki rørir í stólinum?
- Hví kemur Aleks við mati til pápan?
- Hvat halda tit kann vera orsøkin til, at vinfólkini ikki fara inn við Aleksi?
- Aleks sigur, at hann prátar við vinfólkini um alt. Ger hann tað?







# ALEKS

## 4

**Endamálið er at eggja næmingum til at lýsa og seta orð á tað, sum hendir í filminum**

- Hvussu hevur Aleks tað?
- Hvussu halda tit, tað er at vera Aleks?
- Hví langar Aleks knýtta neva í vaskimaskinuna?
- Hvat halda tit er gott í lívinum hjá Aleksi?
- Hvat halda tit, Aleks vildi ynskt var øðrvísi?

# SÁRA OG ALEKS

## Endamálið her er at hjálpa næmingunum at síggja mun á eini stakhending og gerandislívinum

- Halda tit, at tað, sum hendir hjá Sáru og Aleksi kann henda hjá øllum?
- Er tað munur á, hetta hendir eina ferð ella ofta?

Lat børnini svara og prátið saman um tað, tit hugsa. Tín boðskapur er, at tað er gerandisdagurin hjá barninum og ikki einstakar hendingar, sum ger av, um teimum møguliga tørvar hjálp frá barnaverndini.

## Endamálið her er at fáa dialog í lag við næmingarnar um, hvar Sára og Aleks kunnu fáa hjálp

### SÁRA

- Hvat kann barnaverndiartænastan gera, tá ið tey fáa fráboðan um Sáru frá lærara ella heilsusystur? Ella hvat kann barnaverndartænastan gera, um mamma Sáru kemur til teirra og fortelur, at hon drekkur rúsdrekka næstan hvønn dag, og at henni tørvar hjálp til at ansa eftir Sáru?
- Hvørjum kann barnaverndartænasatan hjálpa Sáru og mammuni við?

Lurta fyrst eftir svarunum, næmingarnir royna koma við, so tú heldur teimum í gongd. Síðan brúkar tú svarini í kassanum niðriundir.

### MØGULIG SVAR

- Fær barnaverndartænastan fráboðan frá lærara ella heilsusystur um, at Sára ikki hevur tað gott, seta tey seg í samband við mammuna og Sáru. Barnaverndin skrivar eitt bræv og biður um at sleppa at tosa við tær. Barnaverndartænastan fer eisini á heimavitjan – tað er, at tey vitja mammuna og Sáru heima við hús. Barnaverndartænastan roynir saman við mammuni og Sáru at fáa skil á, hvat gerast kann, so Sára kann hava tað gott heima. *...framhald á næstu síðu*

- Setir mamman seg í samband við barnaverndartænastuna sálv, tosar barnaverndin við mammuna og við Sáru um, hvat kann hjálpa familjuni.

- Barnaverndartænstan kann seta mammuna í samband við ma. Heilbrigdi ella Bláakross. Teir kunnu hjálpa mammuni við rúsdrekkatrupulleikunum, so hon aftur verður før fyri at taka sær av dóttrini, fara upp um morgnarnar, gera mat, vaska klæðir, hjálpa við skúlatingum og práta við gentuna, so sum foreldur eiga at gera.

- Barnaverndartænastan vil stuðla og hjálpa mammuni, tá ið hon roynir at drekka minni. Meðan hon stríðist við at fáa tamarhald á rúsdrekka-nýtsluni, kann tað kortini henda, at hon av og á drekkur ov nógv. Barnaverndartænastan kann tá finna eina umlættingarfamilju, sum Sára kann vera hjá tær ferðirnar, mamman drekkur ov nógv rúsdrekka. Í summun førum kann tað vera hjá ommu og abba, í øðrum kann tað vera hjá mostur og gubba. Barnaverndartænastan hevur eisini samband við aðrar familjur, sum fegnar vilja hjálpa børnum, og sum tí kunnu vera eitt eyka heim hjá Sáru, tá hon hevur tørv á tí.

- Megnar mamman ikki at steðga rúsdrekkanisnýtsluni, kann tað henda, at Sára má flyta í eitt fosturheim. Um Sára flytur í eitt fosturheim, vitjar hon mammu sína, ella mamman kemur at vitja hana. Tey allarflestu børnini, sum búgva í fosturheimi halda sambandið við familjuna við líka.

## ALEKS

- Hvat kann Aleks gera, tá ið pápin er sjúkur og ikki megnar at taka sær av honum, práta við hann, gera mat ella vaska klæðir?

Lurta fyrst eftir møguligum svarum frá nøkrum næmingum, og síðan brúkar tú svarini í kassanum niðanfyri.

## MØGULIG SVAR

- Hann kann tosa við læraran um, hvussu hann hevur tað, ella hann kann tosa við heilsusystrina í skúlanum.

- Lærarin ella heilsusystirin kunnu seta seg í samband við barnaverndina og biðja tey um at hjálpa Aleksi og pápa hansara.

- Aleks kann eisini sjálvur fara til barnaverndina og biðja um at sleppa at tosa við onkran, sum starvast har.

- Hevur hann ikki hug at fara einsamallur til barnaverndina, kann hann hava ein vinmann við sær ella biðja læraran koma við.

- Hvat kann barnaverndin gera, tá ið tey fáa fráboðan frá lærara ella heilsusystur um Aleks? Ella hvat kann barnaverndin gera, tá ið Aleks kemur til teirra og fortelur, hvussu hann hevur tað?
- Hvørjum kann barnverndin hjálpa Aleksi og pápanum við?

Lurta fyrst eftir svarunum, næmingarnir royna koma við, so tú heldur teimum í gongd. Síðan brúkar tú svarini í kassanum niðriundir.

## MULIGE SVAR

- Barnaverndartænastan setir seg í samband við pápan og við Aleks, um lærarin ella heilsusystirin halda, at Aleks ikki hevur tað gott. Tey skriva teimum bræv og biðja um at sleppa at tosa við teir, og so royna tey saman við Aleksi og pápanum at fáa skil á, hvat gerast kann, fyri at Aleks fær tað betri heima.
- Tað sama hevði barnaverndartænastan gjørt, um Aleks sjálvur gjørdi vart við seg.
- Barnaverndartænastan kann seta pápan í samband við stuðulskipanir til vaksin. Teir kunnu hjálpa honum til at verða betur fyri, so hann kann megna at tosa við Aleks, gera mat, vaska klæðir og hjálpa honum, so sum foreldur eiga.
- Barnaverndartænastan kann finna eina umlættingarfamilju til Aleks, so at hann kann vera hjá eini aðrari familju, tá ið pápin er illa fyri. Í summun førum kann tað vera hjá ommu og abba, í øðrum kann tað vera hjá mostur og gubba. Barnaverndartænastan hevur eisini samband við familjur, sum fegnar vilja hjálpa børnum, og sum tí kunnu koma at kenna Aleks og verða eitt eyka heim hjá honum, tá ið hann treingir til tað.
- Um pápin er ella verður ógvuliga ringur, kann tað henda, at Aleks má flyta í eitt fosturheim. Flytur Aleks í eitt fosturheim, kann hann vitja pápa sín, ella pápin kemur at vitja hann.Tey allarflestu børnini, sum búgva í fosturheimi, halda sambandið við familjuna við líka.

# BARNAVERND OG IKKI BÚGVA HEIMA

Her spyrt tú, um nakar av næmingunum veit, hvat eitt fosturheim ella umlættingarfamilja er – kanska kenna tey onkran, sum er til fosturs ella í eini umlættingarfamilju og duga at greiða frá, hvat tað er? Um neyðugt tekur tú tað, sum stendur í faktakassunum, so boðskapurin kemur fram.

## FOSTURHEIM

- Eitt fosturheim er ein góðkend og trygg familja, sum barnaverndin hevur avtalu við. Í hesi familjuni kann eitt barn ella ein ungdómur búgva í styttri ella longri tíð, alt eftir tørvi. Fosturforeldrini skulu gera alt, sum vanlig foreldur gera, fyri at taka sær av børnunum.

- Í Føroyum eru umleið 45 børn til fosturs.

## UMLÆTTINGARFAMILJUR

- Ein umlættingarfamilja er ein góðkend og trygg familja, sum barnaverndin hevur avtalu við. Í hesi familjuni kann barnið ella ungdómurin vera um høgtíðir ella í styttri tíðarskeið. Umlættingarforeldrini gera alt, sum vanlig foreldur gera.

- Í Føroyum eru javnan eini 50 børn og ung í umlættingarfamilju.

# HVAT HJÁLPIR **BANAVERNDIN** VIÐ

Her loysir tú flokkin frá dømunum um Sáru og Aleks og sigur, at tú skalt fortelja eitt sindur alment um, hvørjum barnaverndin kann hjálpa børnum og familjum teirra við. Tey mugu gjarna koma við spurningum.

## TAÐ, BARNAVERNDIN KANN HJÁLPA BØRNUM, UNGUM OG FAMILJUM TEIRRA VIÐ

- Hava samrøður við børn og foreldur, fyri at fáa greiðu á, hvørja hjálp teimum tørvar
- Fáa kontaktfólk til barnið
- Fáa stuðlar til heimið, barnið  og foreldur
- Fáa heimavitjan til barnið
- Fáa ansningarpláss til barnið
- Veita sálarfrøðiliga hjálp til barnið og familjuna
- Veita familjuviðgerð og ráðgeving til familjuna
- Veita fíggjarligan stuðul til frítíðarvirksemi
- Hava vegleiðing og stuðulssamrøður við foreldrini, so tey fáa hjálp til at uppala børnini
- Seta foreldur, sum hava tørv á tí, í samband við stovnar til vaksin, ið kunnu syrgja fyri, at tey fáa viðgerð fyri rúsmisnýtslu ella sálarliga trupulleikar
- Finna eitt fosturheim til barnið
- Finna búpláss á stovni til ung

(Minn næmingarnar um boðskapin í reyða kassanum.)

**MINST TIL! UM TÚ KENNIR ONKRAN ELLA VEITST UM ONKRAN, SUM BER SEG UNDARLIGA AT ELLA GER OKKURT, SUM TÚ IKKI SKILIR...**

- kann vera, at hann/hon hevur trupulleikar
- kanst tú vera vinalig/ur og hjálpsom
- kanst tú bjóða tær til at fara við til læraran ella heilsusystrina at tosa um tað, sum er trupult

So sigur tú, at nú skrivar tú tey telefonnumrini, sum eru viðkomandi, um onkur ætlar at koma í samband við barnaverndina.
(Skriva telefonnumrini á talvuna. Bið næmingarnar skriva tey niður.)

**GIVIÐ ÚT TILFARIÐ 2012:**

Barnaverndarstova Føroya í samstarvi við

SSP Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

www.bvs.fo

**FRAMLEITT UPPRUNATILFAR:**

BUFDIR

Barne, ungdoms og familiedirektoratet í Noreg - 2011.

www.bufdir.no

FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705